**Sunnudagin 29. september kl. 14.00 skipa Sankta Ólavs kirkjulið og Føroyahúsið fyri fyrilestri við heitinum Talufrælsi, haturstala og blasfemi: Hvar gongur markið?**



Tað er Heini í Skorini, ið heldur fyrilesturin. Heini hevur júst givið út bók á altjóða forlagi um evni.

Fyrilesturin er ókeypis og caféein í Føroyahúsinum er opin. Húsin liggur á Vesterbrogade 17A, 1620 København

Hvar ganga mørkini fyri talufrælsinum? Nær verður frí tala til haturstalu? Í hvønn mun skulu religiøsir minnilutar verjast ímóti kritikki, satiru og niðrandi útsagnum? Og hvat skal altjóða lóggáva siga um hesar spurningar?

Líka síðani Sameindu Tjóðir vórðu settar á stovn í 1945, hava slíkir spurningar elvt til politiskt stríð ímillum statir og diplomatar í ST. Hóast sáttmálar eru heimsins lond framvegis rúkandi ósamd um, hvussu idealini um mannarættindi skulu tulkast og setast í verk í praksis.

Ein spurningur, sum aftur og aftur skapar split og samanbrestir og politiskar kreppur, er spurningurin um sambandið ímillum talufrælsið øðrumegin og átrúnaðarligar kenslur ella atlit hinumegin. Einki land í heiminum loyvir absoluttum talufrælsi, men heimsins lond eru grundleggjandi ósamd um, hvørjar leiðreglur skulu vera galdandi í altjóða lóg. Eisini í Føroyum hava mørkini fyri talufrælsinum elvt til politiskt stríð. Dømi eru kjaki um grein 266b og filmin Da Vinci Code.



**Sunnudagin 6. oktober kl. 14.00**:
Guðstænasta v/ Fríðu Marjunardóttir Thomsen, Cand. teol.

**Sunnudagin 20. oktober kl. 14.00**:
Guðstænasta v/ Borgny Brünings-Hansen, presti.

**Hósdagin 24. oktober kl 16.00 Leyvfallstúrur á Vestre Kirkegård**

Menniskju og gravsteinar – um  navnfram fólk í kirkjugarðinum og merkisverdar gravsteinar.



Hósdagin 24. oktober 2019 skipar Sankta Ólavskirkjulið fyri leyvfallstúri við rundvísing. Tað er kirkjugarðsvegleiðarin Stine Helweg, sum vísir okkum runt á víða økinum. Tema hendan dagin er: Menniskju og gravsteinar – um  navnfram fólk á kirkjugarðinum og merkisverdar gravsteinar. Túrurin tekur umleið 2 tímar.
Vit enda rundvísingina í føroyska kirkjugarðspartinum.
Tað er í mesta lagi pláss fyri 40 fólkum og tí er neyðugt at tekna seg til tiltakið. Tekning fer fram á bbh@km.dk ella 51 35 51 90 í seinasta lagi mánadagin 21. oktober.
Vit hittast við høvuðsinngongina á Vestre kirkegårds Allé. Tað er inngongin, ið liggur tættast við Carlsberg S-tokstøðina.



**Sunnudagin 27. oktober kl. 16.00-18.00 er felags norðurlendsk guðstænasta og samrøðusalon í svensku kirkjuni í Keypmannahavn.**



Sungið og lisið verður á øllum norðurlendsku málunum. Eftir guðstænastuna er norðurlanda kaffiborð og samrøðusalon. Endað verður við føroyskum dansi.

Kirkjan liggur tætt við Østerport S-tokstatión á Folke Bernadottes allé 4,

DK-2100 Købenbhavn Ø

**Sunnudagin 2. november kl. 14.00**:
Guðstænasta v/ Borgny Brünings-Hansen, presti.

**Sunnudagin 17. november kl. 14.00**:
Guðstænasta v/ Borgny Brünings-Hansen, presti.
**Eftir guðstænastuna verður aðalfundur hildin.**

**Sunnudagin 1. december kl. 14.00**:
Guðstænasta v/ Borgny Brünings-Hansen, presti.



**Týsdagin 3. december 19.30**:
Koncert við Húsakórinum

**Sunnudagin 15. december kl. 14.00**:
Jólahugni við tónleiki og jólasøgu. Aftaná dansa vit um jólatræið.





**26. december, 2. jóladag, kl. 14.00**: Jólaguðstænasta v/ Borgny Brünings-Hansen, presti.

## Guðstænastur og tiltøk hjá Sankta Ólavs kirkjuliði september - december 2019



**Føroyskar guðstænastur eru altíð 1. og 3. sunnudag í mánaðinum í Hans Egede kirkju.**

**Kirkjan liggur á Vardegade 14, 2100 København Ø.**
**S-tokstøðin Nordhavn liggur umleið 5 minuttir frá kirkjuni og bussarnir 3A, 8A og 37 steðga tætt við.**

**Eftir guðstænastuna er ein drekkamunnur í kirkjustovuni, har høvi er at fáa eitt hugnaligt prát.**

**Sankta Ólavs kirkjulið er á facebook og heimasíðan er at finna á www.fokirkja.dk.**